# Óhappini hjá Atlantsflog halda áfram

**Atlantsflog er í einum óndum sirkli í løtuni. Tað kunnu øll skjótt koma ásamt um, og nú er enn eitt óhapp komið undan kavi. Flogfarið sum fleyg landsliðið til Fraklands skuldi til eina tekniska gjøgnumgongd, men kleyvarskapur frá Swisss Air hevði við sær, at næsahjólið á flogfarinum bognaði, so flogfarið nú er úti í 5 vikur**

FLOGÓHAPP
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Óhappini tykjast ongan enda at taka hjá Atlantsflog. Flapsir, trygdarlendingar, ein lúka sum ikki vil aftur og so ein flogvanlukka. Hetta átti at verið nóg mikið, men nú er so enn eitt óhapp komið undan kavi. Eitt óhapp, sum Atlantsflog als ikki eigur nakra sum helst orsøk í. Men teir eiga flogfarið, sum í Basel fekk boygt stellið kring næsahjólið, og tí ikki flýgur aftur næstu fimm vikurnar.

### Óndur sirkul

Flogfarið fleyg fótbóltslandsliðið til Fraklands, og har var ein teknisk gjøgnumgongd av flogfarinum planløgd. Hesum skuldi Swiss Air taka sær av, og menn frá teimum fóru eisini undir at gera hetta arbeiðið.

Teir komu tó ikki langt, tí kleyvarskapur frá teirra síðu hevði við sær, at næsahjólið bognaði og alt stellið kring hjólið tí má skiftast.

– Flogfarið skuldi flytast inn í hangarin, og ein trukkur ger fast um næsahjólið soleiðis at hann kann toga flogfarið inn. Men tey frá Swiss Air gloyma at loysa bremsurnar, og tí bognar stellið kring hjólið og strukturin rundan um fær skaða, greiðir nevndarformaðurin hjá Atlantsflog, Kristian Andreassen, frá um óhappið, sum eisini sigur, at tað ljóðar sum reinur kleyvarskapur frá Swiss Air, at hetta hendi.

– Hetta er ein umfatandi umvæling tí alt kring næsahjólið skal skiftast út, og tað kann skjótt taka fimm vikur, sigur Kristian Andreassen, sum ásannar, at hatta bert er ein partur av tí røð av óhappum, sum raka Atlantic Airways í løtuni.

### Gott samstarv við Swiss Air

Kristian Andreassen vísir annars á, at Atlantic Airways hevur eitt sera gott samstarv við Swiss Air.

– Vit hava eitt ógvuliga gott samstarv við Swiss Air og tað er als ikki óvanligt, at teir gera uppgávur fyri okkum.

– Vit keyptu eisini eitt flogfar frá teimum í fjør. Okkara RJ100 er eitt flogfar, ið teir hava átt, sigur Kristian Andreassen, sum leggur eina við, at onki fólk hjá Atlantsflog var hjá, tá óhappið fór fram.

– Hetta er bara ein partur av teimum óhappum, sum raka okkum í løtuni, sigur Kristian Andreassen, nevndarformaður í Atlantic Airways.



*Soleiðis sá næsahjólið út fyri 14 árum síðani, tá eitt flogfar hjá Atlantic Airways fór út av breytini í Vágum savnsmynd*

# Eiga at elska tey samkyndu

**- Eg eri bæði skakaður og keddur av, at nakar bukar ella jagstrar tey homoseksuellu. Tað er forkastiligt, og tað hoyrir ongastaðni heima. Heldur ikki eftir orði Guds, sigur Jónfinn Olsen, sum fyrr var politiskt aktivur í Miðflokkinum**

SAMKYND
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Jónfinn Olsen úr Miðvági hevur sitið í stjórnini í Miðflokkinum og hevur eisini verið uppstillaður fyri flokkin. Hann hevur fleiri ferðir umboðað Miðflokkin til kjak um tey samkyndu.

Í dag er hann ikki politiskt virkin, men hevur játtað at gera eina samrøðu, tí hann var skakaður av at hoyra um tann unga mannin, sum var bukaður, tí hann var samkyndur.

- Vit eru øll menniskju, heteroseksuell ella homoseksuell, hinduar ella muslimar, og fólk av øllum rasum. Vit eru øll skapt í Guds mynd. Eingin munur er á okkum, sigur Jónfinn Olsen



*- Vit skulu ikki fordøma, men øll skulu taka avleiðingarnar av sínum egnu gerðum, sigur Jónfinn Olsen*

- Vit skulu ikki fordøma, men øll skulu taka avleiðingarnar av sínum egnu gerðum. Sum trúgvandi mugu vit duga at fyrigeva. Um vit ikki duga at fyrigeva, kann Gud heldur ikki fyrigeva okkum.

- Eg haldi, at vit áttu at sýnt virðing fyri hvørjum øðrum frá báðum síðum. Sjálvt um vit ikki góðtaka alt, so eiga vit at virða hvønn annan. Bíblian sigur, at alt er loyviligt, men ikki alt er gagnligt, greiðir hann frá.

- Vit eiga at elska øll, tí Gud ger ikki mannamun. Vit eiga at elska tann homoseksuella. Vit hava øll sama virði í Guds eygum. Men tað, sum vit velja, koma vit eisini at gjalda fyri tann dag, tá tíðin er komin. Tá er tað, at Guds orð kemur inn og sigur, at vit kunnu velja Kristus ella lata vera.

- Mín uppfatan er, at tey homoseksuellu eru einki øðrvísi enn vit, sum eru heteroseksuell, ella øvugt, sigur Jónfinn Olsen at enda.

# Seyðasøla á Skálatrøð




SEYÐASØLA

Í morgin, leygardagin 14. oktober kl. 14:00, skipar Róðrarfelagið Knørrur fyri góðari seyðasølu í neysti felagsins á Skálatrøð.

Sølan verður skipað á ymsan hátt, bæði við vanligum upprópi og við nýggjum ísletti úr Meksiko, har ein kann gera kvettið og fáa 1 seyð fyri 1 krónu. Seyðurin verður sjálvandi flettur fyri fólk, um tey ynskja tað.

Øll er hjartaliga vælkomin. Allur peningurin fer til virksemið hjá